# BÓLTURIN RUNDUR Í BÁÐUM ENDUM

**Fimm lið berjast um trý sett av heiðursmerkjum og trý lið berjast fyri lívinum, meðan tvey síggja út til at enda í ongamannalandi. Soleiðis er myndin, nú tveir triðingar av landskappingini í fótbólti eru farnir aftur um bak**

Hilmar Jan Hansen

Kappingarárið er farið at halla, og bara níggju landskappingarumfør eru nú eftir, áðrenn onkur fegnast um gull og annar harmast um niðurflyting. Tey ymsu liðini hava sett sær ymisk mál fyri árið, og tá fleiri hava sett sær sama mál, ber illa til hjá øllum at røkka tað, tey ætlaðu sær.

Umfarið mikukvøldið fevnir um fýra dystir, sum hjá átta av liðunum eru byrjanin upp á seinasta triðingin av kappingini. Tó hava ÍF og AB frí tá, tí tey longu spældu sín dyst mitt í juli mánaði, men eftir hesar fýra dystirnar fylgjast øll liðini aftur í dystartali, og tá er støðan meira eftirfarandi aftur.

### Støðugt oddalið

Níggju stig eru millum nummar eitt og nummar fimm, so í toppinum kann framvegis henda nógv, tí ikki færri enn 27 stig eru eftir at spæla um. Í løtuni er NSÍ fimm stig framman fyri HB, sum aftur er trý stig framman fyri ÍF, ið hevur EB/Streym og Víking eitt stig aftan fyri seg.

NSÍ hevur verið væl koyrandi í fleiri mánaðir, og runavíkingar kunnu fegnast um, at teir ikki hava tapt í 14 dystum, sum hava givið 12 sigrar og tveir javnleikir. Við so góðari gongd, er einki at siga til, at NSÍ er fremst. Liðið hevur skotið nógv flest mál og eigur samstundis tættastu verjuna, so oddastøðan samsvarar við avrikini.

Spurningurin í løtuni er, um NSÍ megnar at halda fast, so restin av oddastríðnum skal snúgva seg um at manna hini bæði heiðursmerkjasettini, ella um endaspurturin fer at kosta, so kappingin heilt har frammi aftur verður spennandi.

### Fleiri avbjóðarar

HB sá annars leingi út sum sterki favoritturin, ið skuldi fara avstað við øllum, og tað ber eisini til enn. Men avrikini hava ikki verið nóg støðug, umframt at spælið heldur ikki altíð hevur verið av tí besta, og í løtuni má HB leita sær hjálp frá øðrum, skal oddasessurin vinnast aftur.

ÍF má framvegis sigast at vera liðið, ið hevur gjørt tey flestu bilsin, og eftir málturk í tríggjar dystir, bragdaði aftur á Argjum í gjár, so møguliga fara fuglfirðingar aftur at ota seg uppeftir.

EB/Streymur vann steypafinaluna, men hevur týðiliga viljan og evnini at fara eftir meira. Nokk so nógv avhongur av dystinum mikukvøldið, tá NSÍ vitjar við Margáir, men samansetta liðið líkist aftur í ár einum liði, ið kann fara langt.

Tað sama ger fyri so vítt eisini Víkingur, ið hevði ein niðurtúr nakrar dystir, men nú sær út til at vera væl á veg aftur á slóðina. Heldur kollektivið hjá gøtumonnum og leirvíkingum fram við at gera framstig, kann nógv fáast burturúr.

### Hart botnstríð

Gera vit so eitt lop niður í botnin, hava AB og FC Suðuroy plássini undir niðurflytingarstrikuni, men eru tó ikki so langt frá at fáa B71 aftur. Tað kundi bent á eitt drápiligt niðurflytingarstríð seinastu umførini, har serliga innanhýsis dystirnir millum hesi liðini fáa týdning.

B71 sá eitt skifti út til at fara frá hinum báðum, men við trimum stórtapum á rað við samlaða málmuninum 1-19, sær sandoyarliðið sært út. Tekur B71 sær ikki annað skinn um bak, kann liðið so skjótt vera yvirhálað og farið undir strikuna.

Hinvegin fekk FC Suðuroy ein ordans fong í gjár, tá tað eydnaðist at basa B36, og komandi dystirnir mugu so vísa, um hetta var ein av sjáldsomu sigrunum, ella um hetta er myndin av einari vend, ið kann kveikja eina ljósglæmu í endanum á tunlinum.




AB eigur aftasta plássið, men tykist hvørki betur ella verri fyri enn hini bæði. Men trýstið á argjamonnum er størri enn á hinum báðum, tí AB skal vinna seg fram um tveir kappingarneytar, skal liðið yvirliva.

### Í ongamannalandi

Eitt av stóru skuffilsunum í kappingini er B36, sum hevur verið í nánd av teimum úrslitum, spælaratilfarið annars skuldi verið til. Seks sigrar í 18 dystum er alt ov lítið, og tí er og verður hetta eitt kappingarár í miðjuni, ið felagið ikki kann brúka til tað stóra.

B68 liggur fimm stig aftan fyri B36, men bara trý stig framman fyri B71. Kortini er eingin orsøk til at rokna B68 fyri annað enn eitt miðjulið, tí bæði á pappírinum og vøllinum eru toftamenn nógv betri enn tey trý niðastu. Men í ár verður so eingin endurtøka av í fjør, tá liðið bara var eitt stig frá europeiskum fótbólti.

Sum sagt, er framvegis nógv eftir at spæla um, so hóast nøkur ting neyvan fara at flyta seg so nógv, kunnu onnur ting gera tað. Tí verður seinasti triðingurin av hesi landskappingini óivað minst líka spennandi og áhugaverdur sum teir báðir undanfarnu.

Livst, so spyrst!

*einslistir@kallnet.fo*